# Uttanríkis- og vinnumálaráðið

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 18. desember 2023 |
| Mál nr.: | 23/17788 |
| Málsviðgjørt: | RNA |
| Ummælistíð: | Skrivið frá/til |
| Eftirkannað: | Lógartænastan dagfestir |

**Uppskot til**

## Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um triðja útbjóðingarumfar til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum og í løgtingslóg um fjórða útbjóðingarumfar til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum

(Peningur til jarðfrøðiligar kanningar)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 45 frá 28. mai 2008 um um triðja útbjóðingarumfar til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum, sum broytt við løgtingslóg nr. 94 frá 12. november 2008 og løgtingslóg nr. 41 frá 6. mai 2014, verður henda broyting gjørd:

**1.** Fylgiskjal B í løgtingslóg nr. 45 frá 28. mai 2008 um triðja útbjóðingarumfar til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum verður broytt sum ásett í skjali 1.

**§ 2**

Í løgtingslóg nr. 68 frá 29. mai 2017 um fjórða útbjóðingarumfar til leiting eftir og fremleiðslu av kolvetnum, verður henda broyting gjørd:

**1.** Skjal 2 í løgtingslóg nr. 68 frá 29. mai 2017 um fjórða útbjóðingarumfar til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum verður broytt sum ásett í skjali 1.

**§ 3**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**Skjal 1**

Í fylgiskjali B, § 7, stk. 4, verður “Av gjaldinum verða 250 kr. fyri hvønn ferkilometur at nýta til kravdar umhvørvisárinsmetingar viðvíkjandi kolvetnisvirksemi. Jarðfeingi umsitur peningin og ger í samráð við aðrar viðkomandi myndugleikar og vinnuna av, hvussu peningurin verður nýttur.” broytt til:

“Av gjaldinum verða 250 kr. fyri hvønn ferkilometur at nýta til kanningar í undirgrundini í sambandi við grøna orkuskiftið. Jarðfeingi umsitur peningin og ger í samráð við aðrar viðkomandi myndugleikar og vinnuna av, hvussu peningurin verður nýttur.”

**Skjal 1**

Í skjali 2, § 7, stk. 4, verður “Av gjaldinum verða 250 kr. fyri hvønn ferkilometur at nýta til kravdar umhvørvisárinsmetingar viðvíkjandi kolvetnisvirksemi. Jarðfeingi umsitur peningin og ger í samráð við aðrar viðkomandi myndugleikar og vinnuna av, hvussu peningurin verður nýttur.” broytt til:

“Av gjaldinum verða 250 kr. fyri hvønn ferkilometur at nýta til kanningar í undirgrundini í sambandi við grøna orkuskiftið. Jarðfeingi umsitur peningin og ger í samráð við aðrar viðkomandi myndugleikar og vinnuna av, hvussu peningurin verður nýttur.”

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið

Í sambandi við at leitiloyvi vórðu latin, skuldu oljufeløgini rinda víddargjøld. Partur av hesum varð markaður til at gera kravdar umhvørvisárinsmetingar í sambandi við kolvetnisvirksemi. Av tí at leitiloyvi ikki hava verið latin í føroyskum øki síðani 2016, og av tí at ongin framleiðsla av kolvetni enn hevur verið í økinum, verður mett, at hesin peningurin fer at gera størri gagn, um hann verður nýttur til annað endamál.

### 1.2. Galdandi lóggáva

Treytirnar til latnu loyvini vórðu ásettar í fylgiskjali B til løgtingslóg um triðja útbjóðingarumfar til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum og í skjali 2 til løgtingslóg um fjórða útbjóðingarumfar til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum.

Sambært § 7, stk. 1, í ávikavist fylgiskjali B til løgtingslóg um triðja útbjóðingarumfar til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum og í skjali 2 til løgtingslóg um fjórða útbjóðingarumfar til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum, skal loyvishavarin fyri hvønn loyvisdag rinda eitt árligt gjald, roknað eftir víddini á loyvisøkinum.

Í § 7, stk. 4, í ávikavist fylgiskjali B til løgtingslóg um triðja útbjóðingarumfar til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum og í skjali 2 til løgtingslóg um fjórða útbjóðingarumfar til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum, er ásett, at 250 kr. av gjaldinum fyri hvønn ferkilometur verða at nýta til at gera kravdar umhvørvisárinsmetingar viðvíkjandi kolvetnisvirksemi. Tað er Jarðfeingi, ið umsitur peningin, og sum í samráð við aðrar viðkomandi myndugleikar og vinnuna ger av, hvussu peningurin verður nýttur.

### 1.3. Endamálið við uppskotinum

Eftir sum, at leitiloyvi ikki hava verið latin í føroyskum øki síðani 2016 og ongin framleiðsla av kolvetni enn hevur verið í økinum, verður skotið upp, at inngoldni peningurin, sum oljufeløg hava rindað í sambandi við útbjóðingarumførini, kann gagnnýtast til at gera jarðfrøðiligar kanningar í sambandi við orkuskiftið. Samstarvað verður við Umhvørvismálaráðið og Umhvørvisstovuna.

Tað standa 8.323.040 kr. á konto til endamálið.

### 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Nýskipanin í hesum uppskoti í mun til tað sum stendur í galdandi løgtingslógum er, at peningaupphæddirnar, sum oljufeløgini hava rindað í sambandi við útbjóðingarumførini, í staðin fyri at verða nýttar til at gera kravdar umhvørvisárinsmetingar viðvíkjandi kolvetnisvirksemi, verða nýttar til at gera jarðfrøðiligar kanningar í sambandi við orkuskiftið.

### 1.5. Ummæli og ummælisskjal

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur ikki fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Lógaruppskotið hevur ikki umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri vinnuna.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Lógaruppskotið hevur ikki beinleiðis avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Lógaruppskotið hevur ikki ávirkan á millumtjóðasáttmálar á økinum.

### 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Lógaruppskotið hevur ikki avleiðingar fyri tvørgangandi millumtjóðasáttmálar, sum Føroyar eru partur av. Tað eru Hoyvíkssáttmálin, Evropeiski mannarættindasáttmálin og Sáttmáli Sameindu Tjóða.

### 2.9. Markaforðingar
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar, ið kunnu hava markaforðingar við sær.

### 2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Lógaruppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir ella pantiheimildir, ella ásetingar, sum kunnu skapa onnur størri inntriv í rættindi hjá fólki.

### 2.11. Skattir og avgjøld
Lógaruppskotið hevur ongar ásetingar um skattir og avgjøld.

### 2.12. Gjøld
Talan er um eina broyting í mun til, hvørji endamál innkomni peningurin kann verða nýttur til, og tískil hevur broytingin ongi nýggj gjøld við sær.

### 2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Lógaruppskotið áleggur hvørki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur.

### 2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Lógaruppskotið gevur ikki landsstýrismanninum ella øðrum heimildir til at áseta nærri reglur.

**2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?**
Lógaruppskotið hevur ongar avleiðingar hesum viðvíkjandi.

**2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?**
Lógaruppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

**2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum**

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Nei | |

**Kapittul 3. Serligar viðmerkingar**

**Viðmerkingar til ta einstøku greinina**
**Til §§ 1 og 2:**
**Nr. 1**
Í uppskotinum verður skotið upp at broyta endamálið, ið fæið frá inngjøldunum, sum komu inn í sambandi við triðja og fjórða útbjóðingarumfar, kann verða nýtt til.

Gjaldið upp á 250 kr. fyri hvønn ferkilometur av tillutaðum loyvum til leiting eftir og framleiðslu av kolvetnum at nýta til umhvørvisárinsmetingar viðvíkjandi kolvetnisvirksemi varð fyrstu ferð sett í gildi við løgtingslóg nr. 45 frá 28 mai 2008 (seinast broytt 6 mai 2014) um triðja útbjóðingarumfar, og endurtikið í løgtingslóg nr. 68 frá 29. mai 2017 um fjórða útbjóðingarumfar.

Síðan gjaldið fyrstu ferð varð ásett, hevur bert ein umsøkjari verið, og tí verður mett skilagott, at fæið kann verða nýtt til annað endamál. Fyri at hetta skal bera til, er neyðugt at broyta ásetingarnar í ávikavist fylgiskjali B og skjali 2.

Skotið verður upp at broyta orðingina: "*at nýta til kravdar umhvørvisárinsmetingar viðvíkjandi kolvetnisvirksemi*" til: "*at nýta til kanningar í undirgrundini í sambandi við grøna orkuskiftið*".

Mett verður, at orðingin er nóg breið til at fevna um øll sløg av kanningum í undirgrundini, ið kunnu stuðla undir grøna orkuskiftið. Tað kundi verið kanningar at máta hitalagið í undirgrundini, at kortleggja grundvatnsrenslið í einum øki ella at kanna, hvørt eitt øki hóskar seg at verða nýtt til $CO_2$ goymslu.

Við broytingini fær landsstýrismaðurin heimild til at játta pening til jarðfrøðiligar kanningar av undirgrundini í sambandi við grøna orkuskiftið. Broytingin fer at betra um møguleikan at útvega vitan um eitt nú framleiðslu av varandi orku úr undirgrundini v.m., ið kann verða føroyska samfelagnum at gagni.

**Til § 3**
Lógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Uttanríkis- og vinnumálaráðið, 18. desember 2023

**Høgni Hoydal**
landsstýrismaður

/ Herálvur Joensen